einfaldari
- ger tað einfaldari
September 2012

# Bíbliudagar í Siloa




Ætlanin er at hava eitt fýra daga bíbliuskeið í Siloa í Fuglafirði frá 18. til 21. oktober 2012.

Skeiðið verður hildið undir heitinum: “Eg og samkoman – longur fram á leið” Evni verða: Vitjanartænasta og umsorgan fyri heimi og samkomu, avbjóðingar, persónliga og í samkomuni, heimið og samkoman, bønarlívið, persónliga og í samkomuni, vøkstur, persónliga og í samkomuni, Bíbliulæra, persónliga og í samkomuni, gleði í Harranum, persónliga og í samkomuni. Onnur evni verða eisini. Tilsamans 11 lærarar koma at luttaka. Alt fer fram í Siloa. Møguleiki er fyri gisting í Fuglafirði.

Tekning fer fram hjá Páll á Lakjuni tlf. 74 44 04 / t.post: podl@olivant.fo ella á teldupostadressuni: siloa@siloa.fo.

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Beinleiðis atgongd til Gud

Bøn hevur eyðkent samkomu Kristusar frá byrjan. „Allir hesir hildu á í bønini av einum huga saman við nøkrum kvinnum, Mariu, móður Jesus, og brøðrum Hansara“ (Áp. 1:14). Tann samkoma, ið er eyðkend av bøn og setur bøn í hásæti, er ein samkoma, sum mennist andaliga.

Hjartað í kristinlívinum er eitt lív í samfelagi við Gud, Faðir okkara. Uttan hetta samfelag er tað ómøguligt fyri nakran at liva sum kristin. Samfelag og samskifti við Gud er tann størsti framíhjárættur, sum eitt menniskja kann hava. Hetta er samstundis størsti tørvurin hjá einum menniskja, sum skal hava eitt sunt og gott kristinlív. Ein av keldunum til eitt slíkt lív er bøn.

Bøn er leiðingin, har tey trúgvandi hava beinleiðis atgongd til Gud, og sum signingin flýtur til teirra ígjøgnum. Har er eingin bíðirøð. Eingin bíðitíð. Har er eingin millumpersónur. Í teirri løtu, vit biðja, hoyrir Gud okkum og er til reiðar at svara bønum okkara. Tað er ein undurfullur framíhjárættur hjá einum menniskja at tala beinleiðis við skapara heimsins. Eg fari tí so inniliga at heita á teg um at halga teg til bønarløturnar í samkomuni, soleiðis at bønarlívið í Lívdini kann gerast livandi og virkið.



*Jógvan Zachariassen*

## Hendingar & tiltøk

### Særd av fostutøku?

Er angur um eina fosturtøku partur av lívi tínum, so ert tú ikki eina. Vit leggja í tað og kunnu hjálpa tær. Rachel´s Vineyard vikuskifti verður 26.-28. oktober 2012. Hetta vikuskiftið gevur tær møguleika at koma burtur frá dagligu strongdini av arbeiði og familju at hugsavna teg um pínufulla tíð í lívinum og fara undir lekingina í stuðlandi og ódømandi umhvørvi.
Ring í trúnaði til Mariu Forrestal, tel. 515386, ella Hildu Viderø, tel. 216785

### Legur á Zarepta




Bíbliuskeið frá 2. sept. til 9. sept.
Mansstevna frá 14. sept. til 16. sept.
Kvinnustevna frá 21. sept. til 23. sept.
Hjúnastevna I frá 28. sept til 30. sept.
Hjúnastevna II frá 5. okt. til 7. okt.
Heystlega (15-17 ár) frá 12. okt. til 17. okt.
www.zarepta.fo

### Røðin um Hásongin heldur fram




Hálvan august byrjaði IKTUS at senda røðina um Hásongin. Hetta eru talur, sum Jógvan Zachariassen hevur hildið í Lívdini. Talan er um 5 partar, sum halda fram hendan mánaðin. IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11.00, 16.00, 21.00 og 02.00. Sunnudag frá kl.14.30 og 21.00 verður endursent frá vikuni.
Sí skránna og les meira á www.iktus.fo ella Facebook/Iktus

### Til lukku við barninum

Sunnudagin 22. juli fingu Bjørg Hovland Hjelm og Annfinn Hjelm, Tórshavn, ein son. Hann vigaði 3710 gr og var 54 cm langur.

## Til lukku við hjúnabandinum

Leygardagin 14. juli giftust í Fuglafjarðar kirkju Astrid P. Petersen úr Fuglafirði og Árni Øregaard úr Havn.



Týsdagin 17. juli giftust Karin Oddsdóttir Lamhauge úr Saltangará og Dánjal Mouritsson Joensen úr Havn. Tey giftust á Tenerife, har vígslan gekk fyri seg á strondini, og veitsla fyri eini 20 føroyingum var á hotellinum, har tey búðu.

Leygardagin 21. juli giftust Anita Poulsen og Petur Godtfredson. Vígslan var í Öström á Skálatrøð.



Leygardagin 21. juli giftust Britt Nielsen og John Johansen, bæði av Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn. Vígslan var í samkomuni Lívdini í Skúlanum við Løgmannabreyt.



Leygardagin 4. august giftust Jórun Krett, Hoyvík, og Rani á Borg, Argir, í Hebron á Argjum.

## Til lukku við silvurbrúdleypinum



Týsdagin 17. juli høvdu Beinta og Absalon Áargarð verið gift í 25 ár.

## Til lukku við gullbrúdleypinum



Hósdagin 16. august kundu hjúnini Hjørdis og Jóannes Hansen halda gullbrúdleyp.

## Lívdin ellivu ár

Sunnudagin 26. august vóru 11 ár síðan samkoman Lívdin byrjaði. Fyrstu árini varð hildið til í verkhúsinum Virkni í Berjabrekku og síðan í Hoyvíkar Skúla til flutt varð í Skúlan við Løgmannabreyt.

Ellivu ára føðingardagurin varð hildin við t.d. minnisbroti, ið vísti taluna, sum Jógvan Gerðalíð helt, tá Lívdin fylti 10 ár. Annars var lagkøka og annað gott at fáa.

## Bønarløtur í Lonini

Týskvøld kl. 20.00 eru bønarløtur í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

*Skráin fyri týskvøldini september 2012*

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 4. september | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 11.september | Bønarløta |
| Týskvøldið 18. september | Bønarløta |
| Týskvøldið 25. september | Kyknubólkar |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 2. september

Familjumøti kl. 10.30: Framhaldssøga: Stjørnuljós (1/4)
v. Beintu Áargarð

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Rutt (3/3)
Talarar: Unn og Jógvan Zachariassen



Beinta

### Sunnudagin 9. september

Familjumøti kl. 10.30: Framhaldssøga: Stjørnuljós (2/4) v. Beintu Áargarð

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Samkoman – ein dýrabarur skattur
Talari: Jógvan Zachariassen



Unn og Jógvan

### Sunnudagin 16. september

Familjumøti kl. 10.30: Framhaldssøga: Stjørnuljós (3/4)
v. Beintu Áargarð

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Samkoma, samfelag og hjartalag
Talari: Poul Guttesen

### Sunnudagin 23. september

Familjumøti kl. 10.30: Framhaldssøga: Stjørnuljós (4/4) v. Beintu Áargarð

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Nú, hvussu stendur til í Lívdini?
Talari: Absalon Áargarð



Poul

### Sunnudagin 30. september

Familjumøti kl. 10.30: Vitnisburðir

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Vitnisburðir



Absalon

### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*